52-010/2020

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 010/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Hervør Pálsdóttir, løgtingsmanni, um ásetingar um neyðtøku í revsilógini

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar logmaður at leggja fyri Logtingið uppskot um at dagfora ásetingarnar í revsilógini um neyðtoku, har farið verður frá eini tvingsilsgrundaðari neyðtokuáseting til eina samtykkigrundaða neyðtokuáseting ?
2. Um ja, nær kann væntast, at eitt slíkt uppskot fer til hoyringar ?
3. Um nei, hvor er orsokin ?
4. Hevur logmaður ætlanir um at dagfora aðrar partar av revsilógini ?

Svar:

Til nr. 1, 2 og 3:
Tað er eyðvitað, at báðir partar eiga at vera samdir um kynsliga samveru, um ætlanir eru um tað. Landsstýrið kannar í lotuni moguleikarnar fyri at herða ásetingarnar í revsilógini um neyðtoku.

Galdandi ásetingar um kynslig brotsverk vóru seinast dagfordar í 2017. Í fleiri forum var revsingin fyri brot á ásetingarnar um kynslig brotsverk skerpað, og í sama viðfangi vórðu fleiri ásetingar gjordari greiðari. Í sambandi við broytingarnar í 2017 varð stórur dentur lagdur á rættin til kynsligan sjálvsavgerðarrætt og frælsi. Eitt nú vóru reglurnar um neyðtoku víðkaðar til eisini at fevna um annan ólógligan tvingsil og at útnytta verjuleysa stoðu hjá órættaði.

Samanbera vit ásetingarnar um kynslig brotsverk í Foroyum við tær í Danmark, so eru tær at kalla tær somu. Tað merkir, at revsikarmurin fyri kynslig brotsverk í Foroyum og Danmark í lotuni er so at siga tann sami.

Nakrar herðingar vórðu gjordar í donsku revsilógini í 2018, sum landsstýrið í lotuni umroður at seta í verk í Foroyum.

Nógv bendir á, at ásetingarnar í donsku revsilógini um neyðtoku verða broyttar í næstum. Eftir ætlan verður eitt uppskot lagt fyri Fólkatingið í komandi mánaði. Helst verður farið frá einari tvingsilsgrundaðari neyðtokuáseting til eina áseting, sum er grundað á annaðhvort á frían vilja ella á samtykki.

Landsstýrið hyggur í lotuni nærri at, hvussu norðurlond hava valt at skipa seg á hesum oki. Royndirnar í okkara grannalondum verða síðani brúktar sum eitt grundarlag, tá ið stoða skal takast til, hvussu ein foroysk áseting skal orðast.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

Landsstýrið ætlar í hesum arbeiði at tosa nærri við ymiskar áhugabólkar sum eitt nú KRIS, Amnesty International Foroyar, Foroya Politistafelag og Advokatfelag Foroya, eins og hevur verið gjort fyrr, tá broytingar eru gjordar í revsilógini.

Eisini verður neyðugt at gera undirvísingartilfar og skipa fyri evnisdogum.

Til nr. 4:
Í lotuni verður arbeitt við at dagfora og foroyska revsilógina. Arbeiðið fór í gongd í 2016, eftir at Logtingið heitti á landsstýrið um at dagfora og foroyska revsilógina. Tá ið hetta er eitt umfatandi og tíðarkrevjandi arbeiði, er dagforingin býtt sundur í hóskandi partar. Higartil eru kapitlarnir 14 til og við 19 og kapitlarnir 24 til og við 29 dagfordir og foroyskaðir.

Í næstum verða kapitlarnir 12, 13 og 20 til 23 bornir í Logtingið. Við hesum eru allir kapitlarnir í serliga partinum av revsilógini dagfordir og týddir til foroyskt. Arbeiðið at dagfora og foroyska almenna partin av revsilógini, sum eru kapitlarnir 1-11, er longu farið í gongd.

Eftir ætlan skal arbeiðið at dagfora og foroyska revsilógina verða liðugt í 2021.

Í Tinganesi, 14. september 2020

Bárður á Steig Nielsen
logmaður